# Úrskurður Ítróttardómstólsins

## viðvíkjandi kæru frá B36 um handfaringina av spælaraloyvinum hjá Eyðuni Højgaard

Á fundi m.a. 22. 27. og 30. juni 2005 viðgjørdi Ítróttardómstólurin kæru, dagfesta 5. mai 2005, frá B36 um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá FSF um handfaringina av spælaraloyvinum hjá Eyðuni Højgaard.

Í viðgerðini hava allir 5 nevndarlimirnir luttikið: Anja Hovgaard, formaður, Anna Dam, næstformaður, Poul Hansen, Børge B. Hansen og Eyðbjørn Larsen. Eftir umrøðu mettu allir limir seg verða gegnigar at viðgera kæruna.

**Kæran**
B36 hevur kært úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá FSF frá 24. apríl 2005 um at Eyðun Højgaard ikki hevði gyldugt leikaraloyvi frá FSF til at leika dystir fyri B36 tann 20. og 28. mars 2005, og at B36 av hesi orsøk var koyrt úr kappingini um Løgmanssteypið.

**Grundarlagið undir viðgerðini**
Grundarlagið undir viðgerðini av kæruni er tilfarið, ið kærarin hevur latið Ítróttardómstólinum t.e.

1. Kæruskriv, dagfest 5. mai 2005
2. Úrskurður frá Dómsnevndini hjá FSF, dagfestur 24. apríl 2005.
3. Viðmerkingar frá B36 viðvíkjandi kærufreistini, dagfestar 27. juni 2005.

Harumframt hevur Ítróttardómstólurin fingið skriv frá FSF, dagfest 24. og 30. juni 2005, viðvíkjandi heimildini hjá Ítróttardómstólinum at viðgera kærur um úrskurðir hjá Dómsnevndini hjá FSF, men onki tilfar og ongar viðmerkingar um sjálvt málið.

**Viðmerkingar í samband við heimildini hjá Ítróttardómstólinum**
Í samband við viðgerðina av hesum kærumáli, hevur FSF sett spurnartekin við heimildina hjá Ítróttardómstólinum at viðgera mál, har Dómsnevndin hjá FSF hevur tikið avgerð.

FSF ger galdandi, at partur av § 16 í endamál og skipan Ítróttasambands Føroya, samanhildin við § 41 í kappingarreglunum hjá FSF skal skiljast soleiðis, at Ítróttadómstólurin ikki hevur heimild at viðgera kærur um úrskurðir av avgerðum hjá dómsnevnd FSF's.

Ítróttadómstólurin leggur tó dent á tann partin í nevndu § 16, har ásett er: *"Ítróttardómstólurin kann viðgera kappingarmál og kærumál samsvarandi reglugerð fyri dómsnevndir innan ÍSF og viðgerð av kærum innan starvsøkini hjá feløgum og sersambondum samsvarandi lógunum hjá teimum"* og *seinni: "Ítróttardómstólurin kann altíð, sjálvt um lógirnar hjá feløgum ella sersambondum ikki loyva tí, viðgera, hvørt lógir, avgerðir ella annað eru í samsvar við Evstulóg ÍSF ella Olympiska Skjalið"*. Harumframt skal vísast á § 10 í reglunum fyri dómsnevndir innan ÍSF og viðgerð av kærum, sum eisini eru galdandi fyri dómsnevnd FSF, har ásett er, at avgerðirnar hjá dómsnevndunum eru endaligar og kunnu ikki broytast av øðrum myndugleika enn Ítróttardómstóli ÍSF.

Ítróttardómstólurin kann ikki taka øll mál upp. Soleiðis kann hann t.d. í kappingarmálum einans viðgera spurningar um lóg og mannagongdir og ikki próvspurningar. Ítróttardómstólurin vil tí í hvørjum einstøkum máli viðgera, um hann kann og skal taka mál upp til viðgerðar.

Ítróttadómstólurin hevur avgjørt, at hetta mál er av slíkum slag, at tað kundi verið viðgjørt av Ítróttadómstólinum

Tað er greitt, at ein áseting, har reglur hjá einum sersambandi uttan undantak avskera møguleikan at kæra mál til Ítróttardómstólin er í stríð við Evstulóg hjá ÍSF.

Sersambondini eiga at syrgja fyri, at reglur sum viðvíkja ítróttagreinum tess eru í neyvum samsvari við altjóðareglur og ÍSF lógir og reglur, jbr. § 20, c í endamál og skipan Ítróttasambands Føroya.

**Viðgerðin hjá Ítróttardómstólinum**
Kærast skal til Ítróttardómstólin í seinasta lagi sjey samdøgur eftir, at partarnir hava fingið kunnleika um úrskurðin, jbr. § 7, samb. við § 10 í reglum fyri dómsnevndir innan ÍSF og viðgerð av kærum.

Úrskurðurin hjá Dómsnevndini er dagfestur 24. apríl 2005 og er sama dag sendur B36 við telefaksi. Kæran til Ítróttardómstólin er dagfest 5. mai 2005 og er sama dag móttikin av Kára á Rógvi, fyrrverandi formanni í Ítróttardómstólinum.

Tá kæran er innlatin meiri enn 7 samdøgur eftir, at B36 hevur móttikið úrskurðin, avgjørdi Ítróttardómstólurin at viðgera spurningin um kærufreistina fyrst og bað tí B36 um viðmerkingar til, hví kæran var ov seint innlatin.

Í skrivi frá 27. juni 2005 vísti B36 á, at í úrskurðinum hjá Dómsnevndini verður onki nevnt um, at B36 hevur møguleika at kæra til Ítróttardómstólin. Tað var ikki fyrr enn 5. mai 2005, at formaðurin í B36 í samrøðu við Petur Even Djurhuus, formannin í dómsnevndini, fekk at vita um henda kærumøguleika.

B36 metir, at hesar umstøður tala fyri, at tíðarfreistin fyri innlating av kæruni ikki verður avgerandi fyri, um dómstólurin tekur málið til viðgerar.

**Viðmerkingar Ítróttardómstólsins**
Staðfestast kann, at kæran er innlatin seinni enn 7 samdøgur eftir, at kærarin varð gjørdur kunnugur við úrskurðin. Kærufreistin er sostatt ikki hildin og útgangsstøðið er tí, at kæran verður avvíst.

Tá tað ikki eru ásetingar um, at Dómsnevndin skal vegleiga um kærumøguleikan til Ítróttardómstólin, kann vantandi vegleiðing ikki í sjálvum sær føra til, at sæð verður burtur frá kærufreistini. Ókunnleiki til galdandi reglur verður heldur ikki mett sum nóg góð grundgeving fyri at víkja frá kærufreistini.

Tá B36 sostatt ikki hevur víst á viðurskifti, ið kunnu grundað, at vikið verður frá kærufreistini, ger Ítróttardómstólurin henda

**úrskurð**

Kæran frá B36, dagfest 5. mai 2005, verður avvíst.

Anja Hovgaard Anna Dam Poul Hansen

Børge B. Hansen Eyðbjørn Larsen